Nýggir filmar hesa vikuna

Stað
Filmsheiti, **Dagur/ar *(klokkutíð)***

Svf
Vit síggjast ímorgin (See You in the Morning) - amerikanskur kærleiksfilmur, **30.** ***(21.45)***
Blood and Wine – amerikanskur spenningsfilmur, **30.** ***(23.40)***
The Nutty Professor II – am. skemtifilmur, **31.** ***(20.30)***
Portland – danskur filmur - Óhóskandi fyri smábørn, **03.** ***(21.50)***
Donnie Brasco – am. brotsmannafilmur - Óhóskandi fyri børn, **06.** ***(23.25)***
3+
Bound, **05.** ***(20:00)***
The Virginian, **03.** ***(19:00)***
Canal+
Ginostra, **05.** ***(19:00)***
Harlan County War, **02.** ***(20:00)*** **03.** ***(11:55)***
Hús í helviti, **30.** ***(19:00)***
Murder by Numbers, **01.** ***(9:05)***
Canal+Blá
John Q, **30.** ***(22:20)***
Canal+Gul
Delta-liðið, **30.** ***(23:20)***
Demonurnar hjá Louba, **30.** ***(6:00)***
Harlan County War, **04.** ***(7:35)***
Murder by Numbers, **02.** ***(10:35)*** **04.** ***(20:00)***
DR 1
Clay Pigeons, **30.** ***(22:45)***
L.A. Confidential, **30.** ***(20:30)***
Lightning Jack, **31.** ***(19:45)***
Loyniliga røddin hjá Dianu, **01.** ***(13:50)***
Stjørnan, **02.** ***(21:10)***
DR 2
Meðan náttin sígur niður, **31.** ***(19:55)***
Undir illgruna 1, **05.** ***(19:45)***
Hallmark
Choosing Matthias, **02.** ***(5:00)***
Innocents Abroad, **30.** ***(8:30)***
Kríggið móti álvunum, **02.** ***(8:30)*** **03.** ***(8:30)***
Out Of Order, **31.** ***(21:30)***
TCM
Jazzsangarin, **03.** ***(13:00)***
TV 2 zulu
Andatrongd - Waiting to Exhale, **01.** ***(20:05)***
Bad Girls, **02.** ***(19:00)***
Ein kvinna - tvey lív, **02.** ***(23:35)***
Gentur í troyggjum, **31.** ***(13:10)***
Kærleikans dalur, **30.** ***(19:00)***
Níggju mánaðir, **05.** ***(19:30)***
The Dead Zone, **30.** ***(22:20)***
TV 3
Honkytonk Man, **31.** ***(19:00)***
Hóttanin úr tí ókenda, **31.** ***(23:50)***
TV-1000
Bertram & Co, **04.** ***(13:40)***
Exit Wounds, **31.** ***(19:00)***
More Dogs Than Bones, **01.** ***(19:00)***
Plunkett & MacLeane, **02.** ***(19:00)***
Snow Job, **30.** ***(19:00)***
TVDanmark1
American Dragons, **01.** ***(23:50)***
Fear and Loathing in Las Vegas, **30.** ***(21:05)***
Poltergeist 2: Tey eru aftur, **31.** ***(0:40)***
Skiðskúlin, **04.** ***(20:00)***
The Shining, **31.** ***(22:25)***
TVDanmark2
Áðrenn evstamark, **31.** ***(19:50)***
Heksurnar, **30.** ***(19:00)***

Fríggjadag 30. kl. 18.00

Frasier
Frasier sigur fyri Roz, at hann er troyttur av keðiligu lurtarunum,ið ringja inn undir útvarpssendingum hansara. Hann hevur brúk fyri avbjóðingum og deilir saman við Roz, at hann hevur heitar dreymir um sín mannliga starvsfelaga, matummælaran Gil.

Leygardag 31. kl. 17.00

Í sjeynda himli
Mary skal vera saman við familjuni í vikuskiftinum og øll hugsa um, hvussu tað fer at ganga, nú fyrrverandi sjeikur hennara Robbie eisini býr í húsinum. Matt og Lucy gerast serliga illgrunasom, tá tey finna eina hít...

Sunnudag 1. kl. 19.15

Kendir instruktørar: Oliver Stone CANAL+
Filmdokumentar um, og við, ein av teimum allarstørstu - Oliver Stone. Fleiri-feriðir-oskar-virðislønti leikstjórin sigur um sína yrkisgongd og um filmar sum t.d. „JFK", „Foddur 4. juli" og „Wall Street". Fyrsti dokumentarfilmur hansara „Comandante", har hann prátar við Fidel Castro, verður vístur á Canal+ hendan mánaðin.

Mánadag 2. kl. 20.50

The Rainmaker
Rudy Baylor (Matt Damon) er ein ungur, nýútbúgvin sakførarapisa, ið leitar eftir starvi. Fá feløg eru áhugaði í at seta hann í starv, men ein dagin fær ein moguleika - í einum heldur ivasomum virksemi.

Fríggjadag 30. kl. 20.45

Ein fíggindi millum okkum
IRA-maðurin Frankie McGuire (Brad Pitt) verður noyddur at flýggja úr Norðurírlandi til USA. Har fær hann, við dulnavninum Rory Devaney, hjálp frá dómaranum Peter Fitzsimmons. Hann fær búðstað hjá løgreglumanninum Tom O´Meara (Harrison Ford), ið er av írskari ætt. Hann kennir einki til sanna samleika Rorys.

Leygardag 31. kl. 19.00

Honkytonk Man
Vit eru í Oklahoma, har Wagoneer-familjan fær ein ógvusligan hvokk. Tað er ikki bara tað, at ein ræðuligur sandstormur herjar, men teirra heldur merkverdigi gubbi Red kemur framvið í sínum Kabriolet. Red er „country-sangari", men hann er eisini rættiliga sjúkur av ringari tuberkolosu.

Sunnudag 1. kl. 20.00

Ein gerandisdagur við Jóhan Dalsgaard í Kollafirði
Vit hava bæði sæð og hoyrt nógv til Johan í Kollafirði í samband við valið, har hann, sjálvur annar, var Hin Stuttligi Flokkurin. Men hvør er Johan í Kollafirði? Og hvørji eru hasi høsnini, sum hann tosaði so nógv um í valstriðnum. Upplivið mannin, sum fekk føroyingin at grína og gjørdi hinar flokkarnar í ørviti.

Mánadag 2. kl. 21.25

Hellisbúgvar 2:4
Fyri 2 miljónum árum síðani vóru ikki bara eitt, men fleiri sløg av apumenniskjum til. Paranthropus Boisei hevði stór kjálkabein og kinnaøddar og át og sodnaði nærum allar plantur, meðan Homo habilis át alt, eisini kjøt, fyri at hóra undan. Hetta fekk teirra heilar at vaksa.

Fríggjadag 30. kl. 21.05

Fear and Loathing in Las Vegas
Steinaði ítróttablaðmaðurin Raoul Duke fer saman við sínum minst líka steinaða sakførara-vini Dr. Gonzo á ein biltúr gjøgnum Mojave-oyðimørkina fyri at koma til Las Angeles og Las Vegas. Duke hevur eina arbeiðsuppgávu úti í oyðimørkini. Við einum reyðum Cadillac, sum er fyltur við ólógligum rúsevnum koma teir til hotellið í Vegas.

Leygardag 31. kl. 22.25

The Shining
Saman við konuni Wendy og soninum Danny kemur skúlalærarin Jack Torrance (Jack Nicholson) til eitt stórt gistingarhús langt uppi í fjøllunum. Jack skal virka sum húsavørður, meðan húsið er avbyrgt frá umheiminum í stóra kavanum. Jack ætlar at skriva eina bók, men eitthvørt ræðuligt og óhugnaligt leggur seg yvir gistingarhúsið.

Sunnudag 1. kl. 20.00

What Women Want
Nick er ein mansjauvinistiskur lýsingarmaður, sum hvørs lív verður vent á høvdið, tá kemur út fyri einum „hepnum" óhappi í baðikarinum og uppdagar, at hann við eitt hoyrir tað, ið kvinnur hugsa.

Mánadag 2. kl. 21.30

Parkinson
Michael Parkinson er vertur í virðislontu undirhaldssendingini, har prát við kend fólk er í miðdeplinum. Gestirnir hesuferð eru: Sjónvarpsverurin Jeremy Clarkson, skemtarin Neil Morrissey og sjónleikarinnan Denise Van Outen.

Fríggjadag 30. kl. 23.40



Blood and Wine
Vínsølumaðurin Alex er um at fara á húsagang, tá hann saman við einum sjúkum gimsteinatjóvi stjelur eina dýrabæra hálsketu. Konan er ill um, at hann hevur skølma hennara pengar burtur. Stjúksonurin orkar heldur ikki fyri honum, og einasti uggin er frillan. Kvettið skuldi sleppa honum úr neyðini, men nú koma allir trupulleikarnir.

Leygardag 31. kl. 22.40

Játtanin 2:3
Thomas fær Sigge til at flyta tann gamla bilin og húsvognin - báðir halda, at teir so hava káva út yvir øll spor eftir drápið. Ímeðan eigur Nina ein son, men Thomas hevur ilt við at sættast við, at hann nú er pápi. So verða líkini av tí estlendska parinum funnin, og sápi Thomas, Olof, sum er løgrelgumaður skal standa á odda fyri kanningararbeiðinum.

Sunnudag 1. kl. 22.30

Krígsfotografurin - vangamynd av James Nachtwey
Amerikanarin James Nachtwey verður mettur at vera djarvasti og týdningarmesti krígsmyndamaðurin í okkara tíð. Fylgt verður við Nachtwey, har hann undir kreppuumstoðum tekur tær bestu myndirnar. Eitt djúpt tilognað og eitt sindur smæði menniskja, ið neyvan lívir upp til vanligu hugmyndina av einum harðkókaðum krígsveterani.

Mánadag 2. kl. 21.55

The Simple Life (1)
Jet-settarinnurnar Paris Hilton, arvingi til eina altjóða hotelketu, og Nicole Richie, dóttir 80´ára popp-stjørnuna Lionel Ritchie, býta teirra mærglætistilveru um við eitt heilt vanligt lív úti á landinum. Her skulu tær býgva í fimm vikur. Hetta er ein reality-rød frá 2003.

Týsdag 3. kl. 18.30

Will og Grace
Jack hevur avgjørt at venja saman við Will og Grace. Will er bangin fyri, at Jack fer at dumma seg frammanfyri kundunum hjá Will, ið eisini venja har. Og sum sagt, so gjørt - Jack dummar seg. Will skeldar Jack út, sum kennir seg sáraðan, tá Will kallar hann „gjeikaðan". Men Will gerst brádliga greiðir yvir okkurt við sær sjálvum...

Mikudag 4. kl. 18.00

Frasier
Daphne er knúst, nú drongur hennara, Joe, ger tað liðugt. Roz setir sær fyri at bjarga kvøldinum við at bjóða Daphne við á barr, har sum tað altið eydnast Roz at finna ein mann. Niles er ovurfegin yvir tiðindini um Daphne og Joe, og ætlar at siga Daphne sannleikan um sínar kenslur.

Hósdag 5. kl. 17.10

Áðrenn regnið
Kiril ein grikskur munkur møtir Zamira, einum albanskum muslimi. Zamira hevur einki stað at fara, so Kiril letir hana búgva hjá sær. Hetta setir Kiril í eina vandastøðu, tí hetta hóvar ikki myndugleikunum. Og í London hevur tann gifta Anna eina afferu við einum makedonskum myndamanni. Søgan viðger m.a. støðuna í nýggja statinum Makedonia.

Leygardag 31. kl. 19.05

Teir fyrstu um Atlantshavið
Í dagligari talu siga vit, at Kristoffur Columbus fann Amerika, men tá hesin spurningur verður reistur, hugsa flestu okkara um vínlandsferðirnar hjá teimum gomlu norðbúgvunum. Aðrir gjørdu eisini spennandi ferðir vestur um hav, men allar eru ikki lika væl lýstar.

Sunnudag 1. kl. 14.15

Framvið ánni
Í dag eru tarvafjósini tóm, og langt er millum tarvarnar í Føroyum. Í staðin eru ísáðararnir komnir. Ein av teimum er Júst Rubeksen, bóndi, í Havn. Saman við Júst verður farið at ísáða í Eysturoynni.

Sunnudag 1. kl. 16.00

Frásøgn frá hondbólti
Útvarpið fer farið undir at senda frá endaumfarinum í landskappingini í hondbólti, og ætlanin er at senda allar sunnudagar klokkan 16.00, tá hondbóltsdystir eru. Rættiliga stórur spenningur er um gongdina í 1. deild hjá monnum, har Kyndil hevur lagt seg á odda við Neistanum í hølunum. Men úrslitini av dystunum eru umleypandi, og tí eru minni enn so allar súðir syftar enn. St.ÍF og VÍF hava hug at gera seg galdandi, og KÍF og H71 eru heldur ikki fyri nothing. Kappingin endar fyrsta vikuskifti í apríl.

Týsdag 3. kl. 19.00

Steven Spielberg presenterar: Taken 1 - Beyond The Skies CANAL+
Í 10 films-þørtum fylgja vit trimum familjum - frá Roswell-tilburðunum í 40´unum til í dag. Her siggja vit, hvussu lív teirra verður ávirkað av sambandi við rúmdarverum og, hvussu stjórnin roynir at myrkaleggja tilburðirnar. Fyrsti parturin er leikstjórnaður av Tobe Hooper („The Chainsaw Massacre") - nærsamband av eini aðrari verð...

Mikudag 4. kl. 19.00

Comandante CANAL+
Dokumentarfilmurin av Oliver Stone um Fidel Castro - einaræðisharrin í Kuba. Filmurin er ein einastandandi vangamynd av einum av teimum mest týðandi persónunum í modernaðu søguni hjá Kuba. Castro avdúkar sínar hugleiðingar um Kuba, heimsstøðuna, yndis-filmsstjørnur og privatlívið. Vinarligur, men samstundis provokerandi filmur.

Hósdag 5. kl. 19.30

Vagn í India (5:7)
Ein ferð gjøgnum mystiska og mytiska landið við 1 milliard íbúgvum. Í konganna landi, Rajastan eru bæði elefantar og ein býur við serligum sambandi til James Bond. Í Dungarpur hjá maharajanum eru erotiskar myndir og 99 tikara-høvd kring døgverðaborðið. Lagt til rættis hevur Vagn Olsen.

Týsdag 3. kl. 19.00

28 dagar
Tann altið so veitsluhýrda blaðkvinnan Gwen livir villa stórbýarlívið við pillarum, rúsdrekka og náttarlívi. Men, tá Gwen, í brúdleypinum hjá systir síni, stjelur brúdleyps-limusinina og í fyllskapi, rennir á og oyðileggur brúdleypið, verður hon dømd til tvungna avvenjing í 28 dagar.

Mikudag 4. kl. 20.00

Undan væðingini: Ly 378 til Tel Aviv
Fyri mongum árum síðan vóru Tróndur Djurhuus og Carsten Arnskov í Ísrael og gjørdu eina sending, har eitt av evnunum vóru kibbutzir. Fleiri føroyingar fóru tá í kibbutz og uppaftur fleiri fóru eftir at hava sæð sendingina, hava fólk heitt á SvF um at leita hesa fram undan væðingini.

Hósdag 5. kl. 20.00

Mótsatta kynið
Í hesi undirhaldssending er kynsdysturin á skránni. Skemt er í hásæti undir kjerligari leiðslu av Charlotte Sachs Bostrup. Hon leiðir kjakið millum tvey panel. Hvort panelið hevur ein liðskipara: Skemtarin Omar Marzouk er liðskipari hjá dreingunum, meðan Therese Glahn skal tryggja gentunum sigurin.

Týsdag 3. kl. 23.45

SPOT - Erann DD
Í hesi sendingini sigur Erann frá, hvar hann er ættaður og, hvussu tað er at vera fødd(ur) og uppvaksin í Keypmannahavn og so, sum 12 ára gamalur, at verða sendur á rabbinarakleystur í Ísrael. Hann tosar eisini um kærleikan, konu sína og síni tvey børn, og um tónleikayrkisleiðina, ið byrjaði við eini pilotútbúgving.

Mikudag 4. kl. 22.00

Musiksendingin - sendingin um tónleik
Onnur útgávan av nýggju tónleikasendingini Musikprogrammet - ein seriós tónleikasending fyri tey vaksnu. Hesuferð verður dokumentarfilmurin „Thug Angel" um amerikansku rapp-stjørnuna Tupac Shakur, ið varð myrdur í 1996. Í dag er hann enn mettur at vera ein av teimum størstu innan hiphop-sjangruna. Anja P. Overby er vertur.

Hósdag 5. kl. 21.30

Malèna
Vakurleikin í veruni á Malènu (Monica Bellucci) vekir longsilsfylt eygnabrá og hatri hjá kvinnum í italienska lítla býnum undir krígnum. Eisini tann 13 ára gamli Renatos verður tikin í hesi Malènu. Maður Malènu sigst at vera fallin í krígnum.

Mánadag 2. kl. 19.00

Kult
Í hesum árinum kunnu kend nøvn innan føroyskan tónleik halda jubileum. Tríggir klaksvíksbólkar, sum hava verið sera virknir bæði á palli og við útgávum, hava rundar dagar í 2004. Hjarnar hava verið virknir í 30 ár. Teir vóru stóra rocknavnið í føroyskum tónleik í nógv ár, og eisini í útlondum høvdu teir vind í seglunum.
Frændur hava 20 ár á baki, og bólkurin hevur verið nakað heilt fyri seg í føroyskum tónleiki. Teir savna framvegis fólk, og nógvir av teirra sangum eru vorðnir fólkaogn.
Høvuðsmenninir í Dynamitt hava spælt til dans í 20 ár. Hesin klaksvíksbólkurin hevur serliga gjørt vart við seg við løttum og stundum skemtiligum poppsangum, sum nógvir føroyingar hava tikið til sín.
Hesaferð hittir KULT tónleikarar úr hesum trimum bólkum til prát um gamlar dagar, tónleik, 2004 og framtíðina.
Eyðun Klakstein, sum leggur til rættis.

Hósdag 5. kl. 19.00

Tilvera
Eg havi eina lungnasystir
Fyri nøkrum árum síðani gjørdist Jákup Oluf Breiðaskarð, Fuglafirði brádliga sjúkur. Eftir drúgvar kanningar varð staðfest, at lunguni vóru sjúk. Einasta heilsubót var at fáa nýtt lunga.

Ítróttur

Leygardagin kl. 14.00
Tipsleygardagur

CANAL+
Leygardagin kl. 12.25
Premier League: Manchester Utd-Southampton
Leygardagin kl. 14.45
Premier League Leygardagur
Sunnudagin kl. 13.55
Premier League: Blackburn-Chelsea
Sunnudagin kl. 16.00
Premier League: Arsenal-Manchester City
Mikudagin kl. 0.00
NHL: Philadelphia-Wasshington

CANAL+
Leygardagin kl. 19.25
Seria A: Brescia-Roma
Sunnudagin kl. 19.25
Seria A: Inter-Siena

Canal+ Zap
Leygardagin kl. 18.00
NHL: Pittsburgh-Philadelphia

DR 1 Mikudagin kl. 20.50
Hondbóltur: Randers HK-Viborg HHK, kvinnur

EUROSPORT
WC Bobsleðu úr Cortina d'Ampezzo, Italia
WC Super G úr Garmisch-Partenkirchen, Týsklandi
EM Listskoyting úr Budapest, Ungarn
Snooker Masters úr London, Onglandi
Tennis Australian Open
Fótbóltur African Nations Cup

TV 2 ZULU
WC Strok úr Haus, Eysturríki
EM Hondbóltur úr Slovenia
Íshockey, Svøríki-Danmark

Fríggjadagin kl. 19.00
Bundesliga: Dortmund-Schalke 04
Leygardagin kl. 18.25
La Primera: Atletico Madrid-Osasuna
Leygardagin kl. 20.25
La Primera: Betis-Celta Vigo
Leygardagin kl. 2.15
Nevaleikur úr Phoenix Ariizona, USA
Sunnuadgin kl. 17.55
La Primera: Barcelona-Albacete
Sunnudagin kl. 19.55
La Primera: Deportivo la Coruna-Sevilla

TV 1000
Golf Johnnie Walker Classic
Golf FBR Open
Golf Heineken Classic
Kurvabóltur Euroleague
Nevaleikur Sælandsmeistaraheitið

VARPIÐ
Eykablað í Sosialinum
hvønn fríggjadag

Postmoga 76
110 Tórshavn
Telefon: 341800
Fax: 341801
e-mail: varp@sosialurin.fo

Útgáva: Sosialurin
Umbróting: Hestprent
Prent: Prentmiðstaðin